Nósa Barnaprix 2002 á Oyrabakka:

# Durita skal í finaluna

**Eydnan á Oyrabakka var leygarkvøldið karmur um eitt kvøld, sum fult og heilt var ætlað yngra ættarliðnum. Og í meldrinum av tónleiki, royki og sápubløðrum varð enn ein finalistur funnin til Nósa Barnaprix 2002**

NÓSA BARNAPRIX 2002
*Ragnhild Ellingsgaard*


*Durita Djurhuus av Eidi kann nú droyma um eitt lív millum aðrar sangstjørnur. Hon gjørdist nummar eitt á næst seinasta undanumfarinum av Nósa Barnaprix 2002, og sleppur hon sostatt víðari í finaluna*



Lagt var upp til eitt stórt kvøld, tá næst seinasta undanumfarið av Nósa Barnaprix leygarkvøldið fór av bakkastokki.

10 luttakarar millum 7 og 14 ár vóru við í kappingini, og av teimum skuldi ein finalistur finnast, sum síðan sleppur við í finaluna, sum verður á Kambsdali í novembur mánaða.

Umleið 360 fólk vóru savnaði í Eydnuni, og saman við vertunum báðum, Angelu úr Fres og Baby James, varð skjøtul settur á eitt kvøld, sum skuldi vísa seg heilt at liva upp til allar tær væntanir, sum fólk frammanundan høvdu sett sær.

### Vertir í essinum

Ein og ein komu luttakararnir inn á pallin, sum var pyntaður við ballónum. Onkur hevði dansigentur undir liðini, meðan onnur stóðu einsamøll framman fjøldini og framførdu lagið, sum tey høvdu valt sær. Talan var um kend føroysk barnaløg, har tónleikurin var lagdur á fløgu, meðan luttakarin sjálvur setti rødd til.

Fyrireikararnir høvdu skipað fyri, at eitt stórt ljósshow varð sett til hvørja framførslu, umframt at sápubløðrur eisini duttu undan loftinum og út yvir teir fremstu áhoyrarnar.

Lagt varð til brots kl. 19.00, og síðani varð ferð sett á. Ímillum hvønn luttakara komu Angela og Baby James inn á pallin og fortaldu onkra stuttliga søgu um næsta luttakaran.

Og tey bæði komu framúr væl frá hesi uppgávu. Ferð eftir ferð fekk Baby James mannfjøldina at bresta útúr, meðan Angela eftir besta førimuni royndi at halda stýr á tí kúllaliga lítlabeiggjanum. Skemtiligu viðmerkingarnar hjá teimum báðum rakti plett nærum hvørja ferð, og hetta má sigast at verða eitt gott bragd, tá hugsað verður um, at áhoyrarafjøldin rakk heilt frá barnavognum til ommur og abbar.

### Græt av gleði

Tá allir luttakararnir høvdu verið á pallinum, kom stóribeiggin hjá Baby James, James Olsen, á vitjan. Hann skuldi undirhalda fjøldina, meðan dómararnir stungu høvdini saman fyri at finna útav, hvør skuldi sleppa víðari í finaluna.

Og endiliga upprann so løtan. Saman við Angelu og Nósa komu allir luttakararnir út á pallin, og skilliga sást, at børnini vóru spent. Áhoyrarafjøldin var eins spent og luttakararnir, og allur salurin kókaði nú av berum spenningi,

James og Angela takkaðu stuðlunum fyri teirra avrik, og síðani kom spennandi avdúkingin.

Á fyrsta plássi hetta kvøldið lá Durita Djurhuus av Eiði, og sleppur hon sostatt víðari í finaluna. Umframt hetta skal hon eisini saman við hinum finalistunum syngja inn eina fløgu, sum verður útgivin í sambandi við finaluna.

Nr. tvey gjørdist Durita í Brekkunum, meðan Ester Nónsgjógv Kristiansen endaði á einum triðja plássi.

Eingin ivi var um, at genturnar vóru glaðar fyri tey plássini, sum tær høvdu fingið í kappingini. Tann eina av teimum gjørdist enntá so fegin, at hon bæði rópti og græt av gleði.

Sum skilst vóru áhoyrararnir eisini samdir við dómarunum, tí fagnaðarbrestirnir í salinum mundu ongan enda fingið. Okkurt tárið fekk eisini sníkt seg framat hjá onkrum, tá vinnarin av kappingini slapp framat mikrofonini og framførdi lagið Heimið hjá Brandi Enni enn einaferð.

Sum heild eitt sera væl eydnað tiltak á Oyrabakka leygarkvøldið, har børnini kundu hugna sær við dreyminum um eitt lív millum stjørnurnar. Hetta kvøldið vóru tað tó børnini í Eydnuni, sum vóru tær veruligu stjørnurnar.

Tónleikarin Sunnleif Rasmussen:

# Heiðraður av Nordiska Rådet

**Ein av teim komandi døgunum gevur eitt svenskt utgávufelag út fløgu, sum inniheldur tónleik eftir Sunnleifi Rasmussen. Samstundis verður dugnaligi føroyingurin heiðraður við virðisløn frá norðurlenskum tónleikaráði**

TÓNLEIKUR
*Ragnhild Ellingsgaard*

Fløgan ber heitið "Surrounded", og inniheldur hon tónleik, sum Sunnleif hevur skrivað í árunum 1995 - 2000. Talan er um tónleik, sum hevur tilknýti til Føroyar, og í tveimum av verkunum verða tekstir hjá rithøvundanum William Heinesen eisini nýttir.

Fimm verk eru at finna á fløguni, sum íslenska Caputensemblen hevur spælt inn.

Tónleikurin á fløguni gevur eina persónslýsing av einum dugnaligum ungum manni, sum við støði í jazztónleiki eisini fær íblástur aðrastaðnis frá.

Í verkinum "Arktis" fyri mezzosopran, klarinett, hørpu, slagverki og cello skapar hann eitt ljóðumhvørvi, sum fangar huglagið í tí arktisku ferðini hjá Williami Heinesen, meðan ein í verkinum "Mozaik/-Miniature" kann minnast aftur á fyrstu symfoniina, sum Sunnleif hevur skrivað, eisini nevnd "Oceanic Days".

Tað er svenska útgávufelagið BIS, sum gevur út fløguna. Sama felag hevur áður givið út fløguna "Cantus Borealis. Wind Music from the Faroe Islands/Reykjavik Wind Quintet" í 2000, har fleiri kendir føroyskir komponistar vóru við.

Rannvá Kunoy hevur prýtt vakra fløguhúsan, har reyði og svarti liturin troka seg framat.

### Heiðraður við virðisløn

Umframt nýggju fløguútgávuna hevur Sunnleif eisini fingið tað æru at verða heiðraður við virðisløn frá norðurlenskum tónleikaráði.

Virðislønin verður latin av Nordiska Rådet, og inniber hon eina peningagávu áljóðandi 350 000 danskar krónur. Hetta er samstundis fyrstu ferð, at ein komponistur frá teim sjálvstýrandi økjunum (Føroyar, Áland og Grønland) fær hesa virðisløn.

Virðislønina fær Sunnleif fyri "Oceanic Days", hansara fyrstu symfoni, og verður hon handað Sunnleifi tann 29. oktobur á eini hugnaløtu í Helsingfors.

Á somu hugnaløtu verður eisini 50 ára føðingardagurin hjá Nordiska Rådet hátíðarhildin

*Svenskt útgávufelag gevur út nýggja fløgu við verkum av Sunnleifi Rasmussen. Rannvá Kunoy hevur hevur prýtt fløguhúsan*




*Tann 29. oktobur verður Nordiska Rådets Musikpris handað Sunnleifi í Helsingfors. Hetta er ein virðisløn áljóðandi 350 000 danskar krónur*



Jógvan á Lakjuni um skrásett parlag:

# Ímóti náttúruni

**– Tað verður ikki við mær í samgonguni, at eitt uppskot um skrásett parlag fer niðan í tingið, sigur Jógvan Lakjuni, tingmaður fyri Fólkaflokkin. Seinastu viðmerkingar frá Høgni Hoydal koma illa við hjá honum, og hann heldur, at fólk hava lyndi til at verða ósaklig móti fólki við aðrari fatan**

SKRÁSETT PARLAG
*Heri á Rógvi*


*Jógvan á Lakjuni sigur kortanei til, at samkynt uppskot um skrásett parlag fyri samkynt fer niðan í Løgtingið.*
*Mynd: Jens Kristian Vang.*

Í leygardagsblaðnum fekk kjakið um skrásett parlag enn ein kapitul, tá Høgni Hoydal, landsstýrismaður í lógarmálum, gjørdi greitt, at hann ætlar at bera málið um skrásett parlag niðan í tingið. Hann vil fyrst og fremst fáa eitt aðalorðaskifti í tinginum, men hann heldur seg ikki aftur við at fara í tingið við einum lógaruppskotið. Ein av hansara boðskapum er, at skal tað ikki verða loyvt at skráseta seg í parlag sum samkyndur í Føroyum, so verður tað tingið, sum skal taka ta avgerðina.

– Eg havi einki ímóti, at vit tosa um málið í løgtinginum í einum aðalorðaskifti. Tað verður tó ikki við mær í samgonguni, at eitt uppskot um skrásett parlag fer niðan í tingið. Landsstýrismaðurin í lógarmálum kann sjálvandi, eins og allir tingmenn, leggja øll uppskot fyri tingið, ið hann sjálvur ynskir, men við einum uppskoti um skrásett parlag frá samgonguni er eingin samgongu longur, sigur Jógvan á Lakjuni, tingmaður fyri Fólkaflokkin og formaður fyri Rættarnevndina hjá Løgtinginum. Hann er heldur ikki í iva um, at tað eru fleiri við honum, sum ikki ynskja at vera partur av einari samgongu, har eitt tílíkt mál verður borið niðan í tingið. Fleiri av orðingunum hjá Høgna Hoydal heldur Jógvan á Lakjuni vera langt úti, sum hann tekur til.

– Eg meti, at tað er ein stórur partur av føroyska fólkinum, sum metir málið um samkynt parlag vera eitt átrúnaðarligt mál. Málið er so tætt knýtt at bíbliuni, at tað verður av sær sjálvum eitt átrúnaðarligt mál. Tað skal Høgni Hoydal so heldur ikki gera av, sigur Jógvan à Lakjuni.

Eins og Høgni Hoydal í blaðnum leygardagin, so ynskir Jógvan á Lakjuni eitt sakligt kjak um evnið. Hann heldur, at tað er skeivt, tá fólk hava lyndi til at kalla hann og aðrar, sum ikki eru fyri skrásettum parlagi fyri samkynt, fyri fundamentalistar og annað.

– Tað er ein snaring av veruleikanum, tá fólk vilja skíra okkum, sum eru ímóti skrásettum parlagi fyri samkynd, fyri fundamentalistar, sigur Jógvan á Lakjuni.

Sambært Jógvani á Lakjuni er tað Høgni Hoydal sjálvur, sum eigur ábyrgdina av, at málið hevur fingið eina tílíka vend, tí tað er hann, sum hevur tikið málið fram.

### Samd samgonga

Jógvan á Lakjuni sigur, at teir í samgonguni ikki hava frætt nakað um, at málið um skrásett parlag fer niðan í tingið.

– Vit vóru fyri nøkrum mánaðum síðani til samgongusamráðingar, og tá hoyrdu vit ikki eitt orð um hetta málið. Vit hava tosað um at yvirtaka persóns-, familju- og arvarætt. Vit tosa um at yvirtaka umsitingina av einum málsøki.

Tað passar als ikki, tá sagt verður, at vit ikki vilja taka støðu í málinum. Tað, at vit hava øðrvísi lógir galdandi í Føroyum enn í Danmark, vísir, at vit hava eina støðu til málið, sigur Jógvan á Lakjuni.

Hann metir, at lógin um skrásett parlag er ein lóg fyri seg. Hann vísir til lógina í Danmark, sum er eitt sjálvstøðug lóg, ið loyvir samkyntum at skráseta seg í parlag, t.e. lov om registreret ægteskab. Tað er hesa lógina, ið Jógvan í Lakjuni fyri alt í verðini ikki vil hava setta í gildi í Føroyum. Formaðurin í Rættarnevndini ásannar, at samskiftið innanhýsis í samgonguni ikki er av tí besta, tá menn ikki vita, hvat hinir gera.

Eftir hansara fatan er tað fyrst og fremst ímóti náttúruni, at samkynd skráseta seg í parlag. Og so er tað sjálvandi eisini knýtt at hansara kristna uppvøkstri.

– Hjá mær er tað heilt ótrúliga langt úti, at eitt samfelag kann loyva tveimum av sama kyni somu rættindi sum einum hjúnum. Í mínari verð eru hini Norðanlond farin langt av leið við at loyva skrásettum parlagi. Tey eru í mínari verð tilafturskomin, sigur Jógvan á Lakjuni.

# Fólkakirkjan stór fet nærri yvirtøku

**Áðrenn november mánaður er runnin hevur landsstýrismaðurin við kirkjumálum verið á fýra fundum við føroysk umboð innan kirkjuna og á einum fundi við donskum embætisfólki. —Tá vita vit, hvussu langt er eftir á mál, sigur Annlis Bjarkhamar**

FÓLKAKIRKJAN
*Heri á Rógvi*

Næsti hálvurannar mánaðurin ella so fer at hava stóran týdning fyri arbeiðið at yvirtaka Fólkakirkjuna. Annlis Bjarkhamar, landsstýrismaður við kirkjumálum, sigur, at hon innan ein mánað skal á fýra fundir við ymisk føroysk umboð. Ein fundur verður við bisp, Hans Jákup Joensen og ein við dómpróstin, Bjarna Bæk. Eisini skulu Jákup Reinert Hansen, formaður í Prestafelagnum og Edvin Joensen, formaður fyri Landsfelagið fyri kirkjuráðslimir, á fund við Annlis Bjarkhamar, áðrenn 30 dagar eru runnir.

Ikki nokk við tí, men í november mánaði koma donsk embætisfólk til Føroya at fundast. Hesi koma frá Kirkeministeriet, og saman við føroysku embætisfólkum verður fundur hildin um víðari leistin í sambandi við yvirtøkuna av Fólkakirkjuni. Fundurin verður á embætismannastigi, sigur Annlis Bjarkhamar.

### Betri tóni

Í sambandi við arbeiðið at yvirtaka Fólkakirkjuna hava nógvar ákoyringar verið móti Annlis Bjarkhamar fyri ikki at gera, sum tað stendur skrivað í samgonguskjalinum, t.e. ikki at taka allar partar við í samráð.

Annlis Bjarkhamar sigur sjálv, at hon ongantíð hevur ætlað at hava nakra dulda dagsskrá, og soleiðis verður tað heldur ikki í framtíðini. Teir fýra fundirnir við føroysk umboð verða – sambært Annlis Bjarkhamar – kunnandi, har greiða kann fáast á nøkur ivamál. Eisini ætlar Annlis at tosa nærri um, hví kjakið um Fólkakirkjuna fór soleiðis av sporinum herfyri. Og tónin er vorðin munandi betri, heldur Annlis Bjarkhamar.

Sjálvt samráðingaruppleggið er rættiliga fastlagt, men fundarluttakararnir fáa møguleikan at gera viðmerkingar.

– Tað vóru fleiri, sum mettu, at dialogurin í sambandi við yvirtøkuna ikki var nóg opin. Hetta havi eg tikið til eftirtektar, og vit royna at halda góðar og opnar fundir, har alt verður greitt staðfest, sum fer fram á fundinum. Allir partar ynskja skipað viðurskifti, sigur Annlis Bjarkhamar.

Hóast prestarnir og onnur óivað hava sínar meiningar um yvirtøkuna av Fólkakirkjuni, so ger Annlis Bjarkhamar púra greitt, at avgerðin um yvitøku ella ikki er og verður politisk.

Tingið fær eisini møguleikan at siga sína hugsan, tá málið verður viðgjørt í einum orðaskifti, tá málið er búgvið til tess. Annlis sigur, at tingfólk greitt hava víst áhuga fyri at fáa eitt orðaskifti.

*Àðrenn november mánaður er runnin hevur Annlis Bjarkhamar verið á fimm fundum, sum vera rættiliga avgerandi fyri víðari gongdina í sambandi við yvirtøkuna av Fólkakirkjuni.*
*Mynd: Jens Kristian Vang.*



### Nýta verandi lógarverk

Annlis Bjarkhamar vísir staðiliga aftur, at ætlanin er, ella nakrantíð hevur verið, at yvirtaka fólkakirkjuna, uttan at lógarverk fylgir við.

– Tað hevur ongantíð verið ætlanin bara at yvirtaka, uttan at vita hava nakað lógarverk. Vit skulu yvirtaka og so nýta verandi lógarverk, áðrenn nakað annað verður sett í gildi, sigur Annlis Bjarkhamar.

Eitt álit er skrivað um bygnaðin av fólkakirkjuni, men ógreitt er, nær hesin verður tikin í nýtslu. Eisini skal bygnaðurin og lógarverkið samtykjast fyrst av Føroya løgtingi.

Annlis Bjarkhamar vil ikki seta nakran dag, tá Fólkakirkjan er endaliga yvirtikin.

– Hetta verður gjørt so skjótt, vit eru klár. Hendan næsta tíðin vil vísa okkum, nær vit kunnu koma á mál, sigur Annlis Bjarkhamar.